SøluRásin ´98

Sølustevnan SøluRásin ´98 verður í Ítróttarhøllini á Skála 7.-8. nov.

Á stevnuni verður m.a.: søluframsýning, mótasýning, internetcafé, telduspøl, tónleikur og klovnar

Luttakarar: Fa. Gravsteinur - Tempur - 29 - Plastvirkið - Meinhard Arge P/F - Hárstovan Yndi - Reyni Service P/F - Telebúðin - Føroya Tele - Super Dekk Service - Madam L - Trygd -Føroya Banki - Opus - All-Inter - Gardinstovan - Rakul Rasmussen - Skóbúðin E. K. - Leikabúðin - Josi - Rósan - Ur & optik - Jungmann - Jallur - Tektrade - - Wenzel P/F - Máling & Gólv - MBM - Diana Jacobsen - Stanley - Tubbaksráðið

Uppboðssøla

Hósdagin tann 12.11.1998 kl. 09.20 verður á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, Tórshavn hildin uppboðssøla yvir matr. nr. 1313 a, Tórshavn.

Ognin er ein trøð á Boðaneshamri umleið 11.000 kvm til støddar. Trøðin er ikki víddarroknað, og tí kann nágreiniliga støddin ikki upplýsast. Á ognini standa eini gomul hús, sum ikki eru í nýtiligum standi, umframt úthús.

Trøðin liggur sambært serstakari byggisamtykt í B4-økinum í 3. grundumráði. Almennur vegur gongur ikki til ognina sum er. Servituttir eru lýstir á ognini, og hevur Føroya Jarðarráð átalurætt.

Uppboðssølan er umbiðin av Fríðu Patursson, advokati, Fr. Petersensgøta 9, Tórshavn (j.nr. 950458), sum kann geva nærri upplýsingar um ognina.

Tikið verður ikki ímóti boði undir kr. 2.160.00,00.

Føroya Fútarættur,
tann 2/11-1998

Føroya Landsstýri
Miðfyrisitingin

Frá 1. november 1998 eru tlf. nr. og fax nr. hjá aðalstýrunum hesi:

Stýri	Tlf. nr.	Fax nr.
Løgmansskrivstovan	351010	351015
Fíggjarmálastýrið	352020	352030
Fiskimálastýrið	353030	353035
Almanna- og heilsumálastýrið	354040	354045
Undirvísingar- og Mentamálastýrið	355050	355055
Vinnumálastýrið	356060	356065

Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 28. oktober 1998 við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, og kunngerð nr. 54/1994 grein 1, stk. 4 hevur góðkent:

Undir stovnan,
P/F AB-Egg,
Velbastaður

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Debesartrøð, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 4 vikur frá dags dato.

Heilsufrøðiliga starvsstovan

Tað er lættari at sløkkja eina kontakt enn ein eld!



Hugsa teg um. Tað skaðar ikki.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Øll eru hjartaliga vælkomin á

Novmbermøti í Kirkju- og missiónshúsinum á Argjum

v. Hera Eltør

Hóskvøldið 5. nov. kl. 20.00:
Evni: Tríggjar støður
Sangur: Teir fýra

Fríggjakvøldið 6. nov. kl. 20.00:
Evni: Trý trø
Sangur: Meinigheitskórið
Innsavnan

Leygarkvøldið 7. nov. kl. 20.00:
Evni: Íklæðist Krist!
Sangur: Manskórið í Meinigheitshúsinum
Innsavnan

Sunnudagin 8. nov. kl. 18.00:
Evni: Móti málinum
Sangur: Argjakórið

Almennur fundur

Mint verður á almenna fundin um Framtíð Føroya í Eydnuni á Oyrarbakka í kvøld kl. 20.00.

Sjálvstýrisflokkurin
Norðurstreymoyar sjálvstýrisfelag

Fráboðan um umhvørvisgóðkenning

Við hesum verður gjørt kunnugt, at Heilsufrøðiliga starvsstovan tann 3. november 1998 við heimild í grein 26 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, og kunngerð nr. 54/1994 grein 1, stk. 4 hevur góðkent:

Alistøðina hjá
P/F Gulanum
í Nólsoyarfirði

Góðkenningin liggur alment frammi á Heilsufrøðiligu starvsstovuni. Avgerðin kann kærast til Føroya landsstýri. Møgulig kæra skal sendast Heilsufrøðiligu starvsstovuni, Debesartrøð, 100 Tórshavn, í seinasta lagi 4 vikur frá dags dato.

Heilsufrøðiliga starvsstovan

Listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík

Sýnd verða klipp, áseymaðar myndir og aquarellir.
Framsýningin er opin frá hósdegi 5.11. til sunnudagin 9.11., frá kl. 14–18.
Fernisering 5.11. kl. 14–16.

Cecilia Vestureið
og
Vigdis Sigmundsdóttir Højgaard

Alt timburarbeiði

verður gjørt. Tilboð verða givin.

Tlf. 281693 - 441693

Frá
Stokka-stovuni
í Runavík

Vit hava opið hvønn dag frá kl. 17–23.30, tó fríggjad. og leygard. frá kl. 17–03.30

Góður mat- og pizzamatseðil

Livandi tónleikur hvørt vikuskifti

Vit hava tvey poolborð

Stokkastovan
tlf. 448850